# Kjak



Zakarias Wang

## Óvitska er styrki

*Var eitt av teimum tiltøkunum sum George Orwell nýtti í kendu bók síni 1984 til at avmynda ræðuleikarnar undir totaliterur stýri*

Nú hevur George Orwell fingið ein nýggjan næming.

Erik Ludvigsen hevur eina heila grein í Sosialinum har hann umrøður kelduútgávu mína um fólkaatkvøðuna 14. september 1946, og har viðgongur hann, at hann ikki hevur sæð bókina og avgjørt ikki ætlar sær at lesa hana, men tað forðar honum ikki í at skriva um hesa bók.

Orsøkina sigur hann vera, at hann hevur verið í orðaskifti við meg um okkurt sum hendi í 1814. Har hevur hann eftir øllum at døma ikki staðið seg væl, og nýtir hann hesa nýggju bókaútgávu til at minna onnur á sína vanlagnu.

Men hann hevur onga orsøk til at vera keddur av at hann ikki vann orðaskifti við meg um 1814. Eg havi í mongum framløgum greitt frá tí sum tá hendi, og hvussu viðurskifti Føroya yvirhøvur eru í altjóðaasamfelagnum. Hetta samsvarar als ikki við tað, sum danska stjórnin og hennara klapparar føra fram.

Tað orðaskifti, sum eg havi tikið upp, er eitt vísindaligt orðaskifti, og fyri slík orðaskifti galda nakrar alment viðurkendar reglur.

Ein høvuðsregla er, at alt tað, sum verður sett fram, eru hypotesur. Eitt slíkt uppáhald kann annaðhvørt vera satt ella ósatt, og tann sum setur frameina hypotesu skal tí royna at grundgeva fyri, at hon er sannlík. Øll onnur kunnu lesa framløguna, og halda tey, at uppáhaldið ikki er rætt, er tað teirra skylda yvir fyri sannleikanum at seta fram atfinningar, soleiðis at tann ósanna hypotesan verður afturrikin.

Tað er tí sera áhugavert, at tær framløgur, eg havi havt um Føroya altjóða støðu, ikki eru riknar aftur. Í vísindaligum orðaskifti er hetta tað sama sum ein viðurkenning av, at hesar framløgur eru rættar, og tað má sigast at vera áhugavert, tí tað er samstundis ein almenn viðurkenning av, at tað sum danska stjórnin og tey danahallu higartil hava sagt vera Føroya støðu, beinleiðis er skeivt.

Hetta er sjálvandi synd fyri ein mann sum Ludvigsen. Hann er føddur í 1925 og er uppvaksin í tí danska yvirklassanum í Havn. Tað er nógv fyri hjá honum nú í 2010 at noyðast at viðurkenna, at hann hevur livað upp á eina lívslygn.

Tey flestu onnur, sum eru í somu støðu sum hann, hava so frægt av skili, at tey bara látast sum einki og tiga, men tað orkar hann ikki, og tí roynir hann til fánýtis at verja tær donsku lygnirnar um Føroya støðu.

Men fyri føroyingar er tað ein ómetalig styrki at óvitskan er tað einasta mótstøðumenn okkara hava at duva uppá. 22 ár fyri at Orwell skrivaði sína bók yrkti Janus skald:

*Oh, gev mær megi,*
*hetjumátt,*
*at verja tína hallargatt –*
*um vit er svørð og tol er*
*skjøldur,*
*tá dvina skulu danafjøldir.*

---



Dávid Reinert Hansen
*Forstjóri*
*P/F Vága Floghavn*

## Skeivar upplýsingar

*Dimmalætting ber skeivar upplýsingar um viðurskifti á flogvøllinum*

Niðurstøðan hjá Dimmalætting, at einki er gjørt fyri at bøta um vindupplýsingarnar hesi nógvu seinastu árini, er ikki røtt.

Tvørturímóti. Tað hevur verið arbeitt miðvíst við at finna hóskandi mátitól og mátistøð, ið kunnu geva neyvari upplýsingar um vind og veðurumstøðurnar í sambandi við flúgving.

Niðurstøðan av hesum arbeiði fyrilá í vár og verður ein skipan, ið við grundarlagi í vindmátingum, skýhæddarmátingum og turbulenshagtølum, sigur frá, hvørt flúgvast kann í samsvar við ásettar avmarkingar. Eru umstøðurnar ikki nøktandi verður ikki flogið.

Farið verður í hesum døgum undir at rigga skipanina til, við nakað av installatiónsarbeiði og nakað av telduarbeiði, sum kann væntast at vera liðugt, tá ið árið er úti. Eftir uppseting verður ein innkoyringartíð áðrenn hon verður roknað sum endalig, eins og tillagingar kunnu væntast eftirfylgjandi, tá ið eftirmett verður hvussu skipanin roynist. Tilsamans kann væntast, at hetta fer at vara umleið eitt ár.

Tað er alla æru vert, at Dimmalætting 2. sep 2010 og í leiðaranum 3. sep 2010 skrivar um flogtrygd. Flogtrygd liggur eisini Vága Floghavn á hjarta, bæði nú, tá ið floghavnin er virkisøkið hjá P/F Vága Floghavn og eisini áðrenn, tá ið floghavnin varð rikin av Statens Luftfartsvæsen.

Men flogtrygd er fyri okkum eitt álvarsmál, ið hevur betur uppiborið enn at verða nýtt sum sensatión og atfinning. Skrivingin í Dimmalætting um flogtrygd er sett upp, soleiðis at yvirskriftin á forsíðuni skapar øtta og øsing. Hetta tykist ábyrgdarleyst, tá ið hugsað verður um tann ekka, ið mong frammanundan føla fyri at fara á flog.

---



Høgni Hoydal
*Formaður í Tjóðveldi*

## Hjartaliga vælkomnar, Jóhanna og Jónina

Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum, er í grein á Vágaportalinum endurgivin fyri at siga, at hann vildi ikki tikið lut í einum almennum døgverða fyri íslendska forsætisráðharranum, Jóhonnu Sigurðardóttir og konu hennara, Jóninu Leósdóttir, nú tær eru á almennari vitjan í Føroyum. Hann sigur vitjanina vera eina "provokasjón" sum skal "signalera" ímóti skriftunum.

Er Jenis av Rana skeivt endurgivin, eigur hann at rætta tað beinanvegin. Er hann rætt endurgivin, átti hann at skamma seg.

Eg vil tí gera greitt, at Jenis av Rana og Miðflokkurin umboðar á ongan hátt politisku skipanina í Føroyum ella føroysku tjóðina við sínum óskiljandi og ófólkaligu úttalilsum.

Vit síggja tað hinvegin sum ein stóran heiður, at forsætisráðharrin, Jóhanna Sigurðardóttir kemur á almenna vitjan í Føroyum saman við Frú Jóninu - umboðandi frændatjóð okkara, íslendingar.

Íslendingar eru einasta sjálvstøðuga tjóðin í heiminum, sum uttan fordómar bjóðar føroyskum umboðum á almennar vitjanir í Íslandi og tekur ímóti okkum sum javnlíkar. Á sama hátt vísa bæði íslendskir forsætisráðharrar, forsetar, ráðharrar og onnur íslendsk umboð føroyingum ta sømd, at vitja okkum á jøvnum føti, sum vóru vit fræls tjóð.

Tí er tað tess meiri andsagnarkent, at ein politikari skal signalera persónligar fordómar og persónligt ófrælsi afturímóti.

Hesum taka vit frástøðu frá og ynskja Jóhonnu og Jóninu hjartaliga vælkomnar í Føroyum á almenna vitjan.